## Klaksvíkar Sjúkrahús

700 Klaksvík · Tlf: 45 45 45 · Fax: 45 73 63

# Skrivstovufólk til fyrisitingina

Søkt verður eftir avloysara til fyrisitingina fyri tíðarskeiðið 1. februar 2008 til 31. desembur 2008. Arbeiðstíðin er 0,8.

Arbeiðsuppgávurnar fevna í høvuðsheitum um bókhald/roknskap, telefonavgreiðslu og annars alt vanligt fyrisitingararbeiði.

Umsøkjarar, ið hava skrivstovuútbúgving ella royndir innan økið, kunnleika til at arbeiða við teldu, og førleika at orða seg í skrivt og talu, hava fyrimun.

Løn- og setanarviðurskifti sambært sáttmála við starvsmannafelagið lønarflokk 2.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Svanhild Isaksen, lokal 125.

Umsókn við avriti av prógvum og viðmælum skal sendast til:

Klaksvíkar Sjúkrahús<br>
Att: Umsjónarmaðurin<br>
FO-700 Klaksvík.

**Umsóknarfreist 17.12.2007 kl. 12:00.**

# BÁTAR TIL SØLU



45 x 14,5 fót. Árg 2005. Ferð 21-míl<br>
Motorur : Volvo 450 hk. Koyrt (1200 tímar)<br>
Væl útgjørdur við tólum. Sera gott dekspláss.<br>
Báturin er sum nyggjur.

Hópin av glastrevjabátum til sølu.<br>
Ring og frætt nærri.<br>
Sí www.bosdalafossur.fo

**S/PF BÓSDALAFOSSUR.FO**<br>
**Tel. 333101 · fartlf. 286414**

# Starvslønir

## til listaligt og mentanarligt arbeiði í 2008

Mentanargrunnur Landsins letur umsøkjarum starvslønir við støði í listaligum og fakligum metingum av verkevni ella verkætlan.

Endamál grunsins er at stuðja starv fyri føroyskum máli, bókmentum, list, vísindum og øðrum mentanarmálum bæði hjá leikum og lærdum. Grunnurin skal serliga stuðla tiltøkum og verkætlanum, sum kveikja og menna føroyska myndlist, tónlist, bókmentir, sjónleik og aðra list, sum kann javnmetast við hesar listagreinir.

Starvslønirnar kunnu verða latnar soleiðis:<br>
1 starvsløn galdandi í 3 ár og starvslønir galdandi í 1 mánað til 12 mánaðir.

Upphæddin á starvslønini svarar til lærarulønina á fólkaskúlans lønarstigi 21, stigi 1, sum eftir 1. okt. 2006 er kr. 22.010,74 um mánaðin.

**Umsóknir skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagi mánadagin 31. desember 2007**

**Umsóknarbløð** fáast á heimasíðuni ella á skrivstovuni.

**Mentanargrunnur Landsins** - Tórgarðsgøtu 42 - FO-100 Tórshavn Tlf. 32 08 42 - fax 31 19 98<br>
mentan@mentanargrunnur.fo - **www.mentanargrunnur.fo**

## Barnagarðurin á Konmansmýru

Hoyvíksvegur 41 b · Tlf. 31-787 · Fax: 31-6076

# PEDAGOGAR

## Vit søkja eftir 3 pedagogum

Søkt verður eftir 3 pedagogum 35 tímar um vikuna, at byrja 1. feb. 2008 ella eftir nærri avtalu.

*Á stovuni eru 17 børn í aldrinum 3-6 ár.*

Stovnurin er ein sjálvsognarstovnur. Børnini eru í aldrinum 3-7 ár.

**Í okkara arbeiði leggja vit dent á:**

- *Trivnaðin*
- *Opinleika*
- *Samarbeiði*

**Vit ynskja at umsøkjarin:**

- *Hevur góð samstarvsevni*
- *Er røkin, nærlagdur og álítandi*
- *Nýhugsandi og ígongdsetandi*
- *At tú heldur tað verða spennandi og mennandi*

*Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið Føroya.*

Meiri fæst at vita við at ringja til okkum og tosa við leiðaran Elsebet Bolstad ella varaleiðaran Eyðvør Jensen. TLF. 317878

Umsókn við avriti av prógvið og møguligum viðmæli skal verða okkum í hendi seinast 4. januar 2008 Barnagarðurin á Konmansmýru

**Barnagarðurin á Kommansmýru**

# Bioanalytikari

Í samband við økt virksemi søkir Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu eftir einum bioanalytikara at byrja skjótast tilber. Full arbeiðsvika, men møguleiki er fyri niðursettari tíð.

**Førleikakrøv**

- bioanalytikaraútbúgving
- teldukunnleika

Við tað, at deildin hevur fleiri granskingarverkætlanir í gongd í senn, er ynskiligt, at umsøkjarin er fleksibul, soleiðis at hann kann laga seg til tær ymisku granskingarætlanirnar.

Deildin hevur, síðan hon varð sett á stovn í 1988, skipað fyri ymiskum granskingarvirksemi innan bæði arbeiðslæknafrøði og fólkaheilsu. Hetta virksemi, sum hevur verið í neyvum samstarvi við starvsfelagar í Evropa, USA og Asia, er fíggjað við peningi frá almennum og privatum grunnum í Føroyum, USA, ES og Danmark. Ein megintáttur í granskingini er, hvussu dálkingin av heimshøvunum ávirkar heilsuna hjá føroyskum børnum – og nú eisini hjá vaksnum fólki. Á deildini starvast í løtuni 15 fólk.

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum Bioanalytikarafelagið og Fíggjarmálaráðið

Umsóknarfreistin er 17. desember kl. 12.00.

Nærri fæst at vita við at ringja á tlf. nr. 316696 ella 216696 til Pál Weihe, yvirlækna, ella t-post pal@health.fo.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og øðrum upplýsingum skal sendast til:

**Deildina fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu**<br>
Sjúkrahúsverk Føroya<br>
Sigmundargøtu 5<br>
Postsmogu 14<br>
FO-110 Tórshavn